# VEST MANNA DAGAR 2025



# VÆLKOMIN Á VESTMANNADAGAR



Aftur í ár eru Vestmannadagar, har vit í eina lítla viku leggja dent á nakað av tí, sum bygdin hevur at bjóða.

Vestmannadagar eru dagar, har vit savnast – ung sum eldri – fyri at hátíðarhalda Vestmanna, og tað, sum eyðkennir okkara bygd. Tað eru dagar sum hesir, har vit veruliga kenna eitt samanhald, hvussu nógv okkara forfedrar hava megnað, og hvat vit í dag megna saman.

Vestmannadagar snúgva seg um siðir, hugna, um ætt, vinir og kenningar, og tað, sum annars hoyrir døgunum til.

Summi hava sikkurt longu lagt sær ætlanir fyri, hvørji tiltøk skulu vitjast og onnur taka tað sum tað kemur, tí óansæð, so er nógv at fara til, og okkurt er til allar aldursbólkar og øll áhugamál.

Vestmannadagar eru vorðnir ein føst siðvenja hvørt ár fyrstu vikuna í september. Í ár er tað tólvtu ferð, at dagarnir verða hildnir. Í rúgvusmiklu skránni kann staðfestast, hvussu fjølbroytt og mentanarríkt Vestmanna í veruleikanum er, og tað er takkað tykkum, sum her búgva og virka.

Á Vestmannadøgunum koma vit saman í gleimi sum vestmenningar, sama um tú er føddur og búsitandi her, ella um tú er tilflytari ella fráflytari. Tað er ongantíð so sjónligt sum til morgunmatin í høllini, tá ið omanfyri túsund fólk koma saman frá nær og fjar, tí øll hava onkursvegna eitt tilknýti til bygdina.

Vestmannadagar eru komnir fyri at vera, og tað fegnist eg um, tí einki liggur fremri á hjarta enn breiður trivnaður, har okkurt er til øll.

Latið okkum saman skapa enn fleiri minnir og hátíðarhalda alt tað, vit eiga og alt tað, sum vit eru her í Vestmanna.

Eg fari at ynskja øllum nakrar góðar Vestmannadagar.

Sára Jógvansdóttir,
*borgarstjóri*

# MIKUDAGUR 3. SEPTEMBER

| | | |
|---|---|---|
| 17.30 | TORGIÐ | **VESTMANNADAGAR VERÐA SETTIR**<br>*Jákup Jóanesarson, nevdarlimur í trivnaðarnevndini í Vestmanna kommunu, setir Vestmannadagarnar og hornorkestrið spælir.* |
| 17.30 - 20.00 | GERÐISVEGUR 10 | **SØLA AV HEIMAVIRKAÐUM VØRUM**<br>*Kom á gátt og síggj tær ymsu heimavirkaðu vørurnar.* |



| | | |
|---|---|---|
| 17.45 | TORGIÐ | **RENN Í LITUM**<br>*Lat teg í tíni litríku ella hvítu klæðir, so tú sært út sum ein litpalett, tá ið renningin er av. Renn, gang, trilla ella tað, sum tú hevur hug til. Byrjað verður við Torgið, síðan verður farið fram við kirkjuni og út til Grønanesheimið og heimaftur eftir kaiini og endað verður við Fiskastykkið, omanfyri John'sa handil.* |
| 17.30 - 20.00 | BAKKAVEGUR 44 | **FÁ HOL Í OYRUNI**<br>*Salongin á Bakkavegi 44, í kjallaranum hjá skómakaranum, hevur opið. Kom á gátt og fá hol í oyruni. Kostnaður fyri bæði oyru 275 krónur. (vanligur prísur 355 krónur)* |
| 17.30 - 21.00 | VEKTARBÚÐIN | **KAFE LETUR UPP**<br>*Kom á hugnaligu kafeina í søguligu Vektarbúðini og íbúðini, har fyriskiparanir, Helga Gásadal og Kristina Sundstein Borgarlíð selja ymiskt søtt afturvið einum góðum drekkamunni.* |
| 18.00 - 21.00 | SPÆLHÚSIÐ | **FERNISERING**<br>*Herit Magnussen letur upp listaframsýning í Spælhúsinum og trubadururin og vinnarin av Sement 2025, Hans Andrias, fer at syngja og spæla nøkur løg.* |
| 20.00 | VEKTARBÚÐIN | **BÓKAFRAMLØGA**<br>*Lagnusøgur hjá fiskimonnum. Óli Jacobsen greiðir frá vanlukkum á sjónum, sum hava samband við Vestmanna, m.a. um vestmenningin, John á Bakkanum, sum við Queen Victoriu í 1931 lat lív fyri at bjarga sínum skipsfeløgum.* |

**20.00** | **SILKIENNI**

**TABLETOP FØROYAR - BORÐSPØL**
*Kom og spæl borðspøl! Borðspælsáhugafelagið TableTop Føroyar verður í Silkienni við teirra vælumtókta borðspælskvøldi. Tiltakið er fyri ung sum eldri.*

# HÓSDAGUR 4. SEPTEMBER




**09.30** | **DAGSTOVNAØKIÐ**

**BAMSURENNING**
*Barnabati og dagstovnaøkið í Vestmanna kommunu skipa fyri bamsurenning fyri børnunum á dagstovnaøkinum. Bamsurenningin varpar ljós á Betri vinir, ið er ein fyribyrgjandi verkætlan móti happing.*

**14.00 - 18.00** | **BØGØTA 4**

**BLÓMURBYKATHE**
*BlómurbyKathe hevur opið og selir alskyns sløg av blómutyssum, urtapottum v.m.*

**15.00 - 17.00** | **VIÐ KONGSKJALLARAN**

**GRILL FYRI ØLL**
*Børn og vaksin verða boðin til hugna og grillaðar pyslur við øllum tilhoyri uttanfyri Kongskjallaran, við skúlavøllin.*

**15.00 - 19.00** | **HEYGATÚN 4**

**ELVA LEIR**
*Kom og mála leir fyri hálvan prís. Elva Leir Kafé lat upp fyri trimum árum síðan júst á Vestmannadøgum, og tí vilja vit at bjóða øllum á gátt hesar dagar*

| | | |
|---|---|---|
| **17.00 - 18.00** | **SKÚLAVØLLURIN** | **KROPSLIGUR ORÐADRÁTTUR**<br>*Ársins fótbóltsbrak millum grannarnar, Kvívíkar kommunu og Vestmanna kommunu. Dómarar vera borgarstjórarnir í Vága kommunu og Eysturkommunu.* |
| **17.00 - 22.00** | **DISVOY** | **DISVOY HEVUR OPIÐ** |
| **17.00 - 20.00** | **SPÆLHÚSIÐ** | **LISTAFRAMSÝNING**<br>*Listaframsýning við Herit Magnussen í Spælhúsinum.* |
| **17.30 - 20.00** | **GERÐISVEGUR 10** | **SØLA AV HEIMAVIRKAÐUM VØRUM**<br>*Kom á gátt og síggj tær ymsu heimavirkaðu vørurnar.* |



| | | |
|---|---|---|
| **18.00- 21.00** | **VEKTARBÚÐIN** | **FERNISERING OG KAFE**<br>*Kom og uppliv fjølbroytta list. Listaframsýning letur upp í Vektarbúðini og John'sa handli við málningum og aðrari list hjá vestmenningum. Listafólkini sjálvi eru á staðnum. Kafein er eisini opin og okkurt gott til góman verður at fáa.* |
| **18.00** | **SILKIENNI** | **SJAVSKAPPING**<br>*Sjavskapping á Silkienni. Vinningar verða latnir til nr. 1, 2, og 3.* |
| **20.00** | **SPÆLHÚSIÐ** | **TÓNLEIKUR OG TÓNLEIKAPRÁT**<br>*Kom til eina hugnaliga løtu í Spælhúsinum. Vestmenningurin og sangskrivarin, Martin Joensen, fer at práta um síni løg og spæla og syngja nøkur teirra.* |

# FRÍGGJADAGUR 5. SEPTEMBER

| | | |
|---|---|---|
| **07.00 - 11.00** | **MAGN** | **BJÓÐAR KAFFI, WIENARBREYÐ OG SUNKIST** |
| **09.00 - 17.00** | **FJØRUKRÓGVIN** | **FJØRUKRÓGVIN HEVUR OPIÐ**<br>*Vitja livandi og flotta søgusavnið við voksfigurum úr Føroya søgu ella fá tær ein bita í útistovuni. 10 % verður latið av vanliga kostnaðinum.* |
| **11.00 - 16.00** | **Á-HANDILIN** | **BJÓÐAR OKKURT SØTT V.M.** |
| **14.00 - 18.00** | **BØGØTA 4** | **BlómurbyKathe**<br>*BlómurbyKathe hevur opið og selir alskyns sløg av blómutyssum, urtapottum v.m.* |
| **14.30 - 17.00** | **MIÐNÁM** | **KAFE**<br>*2. flokkur á Miðnámi bjóðar til hugnaliga kafe, har søla verður av køkum, kaffi, toast v.m. Eisini verður tombola.* |
| **15.00** | **MIÐNÁM** | **BARNABIOGRAFUR**<br>*Biografur fyri børn verður í í fyrilestrarsalinum. Kostnaður 50 krónur. Eisini verður poppkorn, sunkist v.m. til keyps.* |
| **15.00 - 19.00** | **HEYGATÚN 4** | **ELVA LEIR**<br>*Kom og mála leir fyri hálvan prís. Elva Leir Kafé lat upp fyri trimum árum síðan júst á Vestmannadøgum, og tí vilja vit at bjóða øllum á gátt hesar dagar* |
| **15.00 - 22.00** | **BAKKAVEGUR 4** | **ROKOKO KLÆDNASØLA**<br>*Klædnahandilin, Rokoko, hevur støkkupp-sølu til kvinnuna, mannin og børnini í gamla skógvahandlinum hjá Nicolinu.* |
| **16.00 - 18.00** | **SEV** | **GRØN ORKA OG CANDYFLOSS**<br>*SEV bjóðar á gátt. Ítrivsborð og candyfloss verður til børnini og eisini er okkurt til tey vaksnu. Klokkan 17.00 verður konsert við Brim.* |
| **16.30 - 18.00** | **BÁTAHYLURIN** | **RÓGVING**<br>*Kom og rógv ein túr. Kappróðrarfelagið VÍF bjóðar øllum at rógva. Kappróðrarbátar liggja við bátabrúgvarnar og royndir rógvarar eru við í bátinum og leggja lag á.* |
| **17.00 - 19.00** | **VESTPACK** | **VESTPACK BJÓÐAR INN**<br>*Vestpack setir aftur í ár hoppiborgir fram til børnini og bjóðar Mist, og softice og ymiskt leskandi til vaksin.* |
| **17.00 - 20.00** | **VESTPACK ØKIÐ** | **MATMARKNAÐUR**<br>*Matvognar selja døgurðamat millum Vestpack og Á. Borð verða sett upp á økinum og til ber eisini at sita undir taki í goymsluni hjá Vestpack.* |
| **17.00 - 00.00** | **DISVOY** | **DISVOY HEVUR OPIÐ** |
| **19.00 - 21.00** | **SPÆLHÚSIÐ** | **LISTAFRAMSÝNING**<br>*Listaframsýning við Herit Magnussen í Spælhúsinum.* |
| **20.30 - 21.30** | **VESTMANNA CAMPING** | **HUGNALØTA**<br>*Vestmanna Camping bjóðar á gátt til góðar og undirhaldandi tónar við Kamping orkestrinum.* |

| | | |
|---|---|---|
| 21.30 | FAER ISLES DISTILLERY | **TÓNLEIKABINGO**<br>*Kom við til Føroya skemtiligasta bingo. Diskobingo er sum vanligt bingo, men ístaðin fyri tøl, spæla vit stuttar útgávur av kendum løgum. Tú lurtar eftir løgunum og merkir tey av á bingoplátuni. Vinningar verða latnir fyri fulla plátu. Eftir spælið verður ljóðanleggið tendra til karaoke.* |
| 22.00 | STAÐIÐ | **UNGDÓMSKONSERT VIÐ 21KNM**<br>*Teir hava sett lív í óteljandi ungdómsveitslur runt landið. Nú koma Jens Eli, Petur, Brandur og Hans Oluf til Vestmannar at sparka lív í. Við løgum sum "Mat í Luux", "Effo date" og "Camping" fáa teir fjøldina at syngja, flenna og dansa við.* |

# LEYGARDAGUR 6. SEPTEMBER

| | | |
|---|---|---|
| 09.30 | ÍTRÓTTAHØLLIN | **MORGUNMATUR Í HØLLINI**<br>*Felags morgunmatur, sangur og eisini verður ársins herðaklapp handað.* |
| 10.00 - 12.30 | BÓKASAVN | **BØKUR Á BÓKASAVNINUM**<br>*Vit rudda út. Fyll posan fyri 20 krónur.* |
| 12.30 - 15.30 | ÍTRÓTTAHØLLIN | **SØLUMARKNAÐUR**<br>*Sel heimavirkað, grønmeti ella brúkt vælhildin pløgg, leikur v.m. Tilmelding til søluborð fer fram við at*<br>*senda boð til Anju Haldansen á 522553 ella skriva til hennara á Messenger. GG! Avmarkað pláss.* |
| 12.30 - 15.30 | ÍTRÓTTAHØLLIN | **KAFFI OG KAKUSØLA**<br>*8. flokkur selir ymiskt gott til børn og vaksin.* |
| 12.30 - 15.30 | ÍTRÓTTAHØLLIN | **FÁ HOL Í OYRUNI**<br>*Michelle skjýtur hol í oyru v.m. Kostnaður fyri bæði oyru 275 krónur.*<br>*(vanligur prísur kr. 355 krónur)* |
| 12.30 - 15.30 | ÍTRÓTTAHØLLIN | **FLÆTTUR Í HÁRIÐ**<br>*Fá vakrar flættur, kular halar, litir, glimmur v.m. í hárið. Ymiskt verður at velja í hjá bæði gentum og dreingjum. Kostnaður millum 10 og 50 krónur.* |
| 12.30 - 15.30 | ÍTRÓTTAHØLLIN | **TEKNIBORÐ**<br>*Borð eru frammi, har børn kunnu royna síni listarligu evni við pappíri og litum. MB skipar fyri.* |
| 13.00 - 19.00 | HEYGATÚN 4 | **ELVA LEIR**<br>*Kom og mála leir fyri hálvan prís. Elva Leir Kafé lat upp fyri trimum árum síðan júst á Vestmannadøgum, og tí vilja vit at bjóða øllum á gátt hesar dagar* |
| 15.00 - 20.00 | SPÆLHÚSIÐ | **LISTAFRAMSÝNING**<br>*Listaframsýning við Herit Magnussen í Spælhúsinum.* |
| 15.00- 19.00 | KRAMBÚÐIN | **KAFE, LISTAFRAMSÝNING OG SØGUFRÁSØGN**<br>*Kom við á áhugaverda rundferð í søguliga handlinum saman við Fróða Skúvadal, sum fer at greiða frá. Nógvir eru krókarnir á lofti og í kjallara, ið fá hava sæð. Kafein og listaframsýniningin hava eisini opið, har bjóðað verður gott kaffi og fjølbroytt list.* |
| 15.00 - 22.00 | BAKKAVEGUR 4 | **ROKOKO KLÆDNASØLA**<br>*Klædnahandilin, Rokoko, hevur støkkupp-sølu til kvinnuna, mannin og børnini í gamla skógvahandlinum hjá Nicolinu.* |



| | | |
|---|---|---|
| **15.00 - 03.30** | **BAKKAVEGUR** | **MATSØLA Á BAKKAVEGI** |
| **15.00 - 03.30** | **DISVOY** | **DISVOY HEVUR OPIÐ** |
| **15.30 - 18.00** | **BAKKAVEGUR** | **BARNATILTAK VIÐ SKÓTUNUM ÚR KVÍVÍK**<br>*Skótaliðið úr Kvívík skipar m.a. fyri bogaskjóting, sneisabreyði og seymsláðing fyri børn og ung.* |
| **16.00 - 17.15** | **BAKKAVEGUR** | **BARNATILTAK**<br>*Við Angelu og Hannibal. Eisini syngja børn úr Vestmanna og DJ Kingz.* |



| | | |
|---|---|---|
| **17.30** | **KAIIN** | **FISKIKAPPING FYRI BØRN**<br>*Fiskikapping verður fyri børn á kaiini niðan fyri fiskavirkið. Tann, ið fær tyngsta fiskin, vinnur. Vinningar verða latnir til nr. 1, 2 og 3 í kappingini. Heitt verður á foreldur um at lata børnini í bjargingarvest.* |

**19.00 - 19.30** | **BAKKAVEGUR**

### GRILLAÐUR LAKSUR

*Øll eru vælkomin at royna grillaðan laks frá Hiddenfjord. Manningin í Brim grillar og Gundur ger sítt vælumtókta eplamorl. Avmarkað nøgd av laksi.*



**19.30 - 20.00** | **BAKKAVEGUR**

### FØROYSKUR DANSUR

*Kom og sláið ring saman við Norðstreymoyar Dansifelag.*

**20.00 - 21.00** | **BAKKAVEGUR**

### SYNGIÐ VIÐ

*Rógvutrio fer at syngja fyri undir góðum felagssangi, saman við góðum tónleikarum úr bygdini. Sangheftið kunnu heintast á heimasíðuni vestmanna.fo.*



**21.00** | **BAKKAVEGUR**

### KONSERT VIÐ DANNY & THE VEETOS

*Danny & The Veetos fara við sínum lívligu og eyðkendu sangum at seta lív í Bakkaveg, við m.a. Alright og Farvæl.*



| | | |
|---|---|---|
| **22.00** | **BAKKAVEGUR** | **KONSERT VIÐ HAMRADUN**<br>*Tað verður buldur og brak, tá ið Hamradun trio fer at framføra sín væl umtókta kvæðarokk.* |



| | | |
|---|---|---|
| **23.00** | **BAKKAVEGUR** | **KONSERT VIÐ LAILU OG MALAN**<br>*Laila Carlsen og Malan Eyðunsdóttir seta punktum við einum rimmar endabraki, har tær saman við við bólki fara at syngja kend útlendsk og føroysk hitt.* |
| **00.00 - 03.30** | **DISVOY** | **LIVANDI TÓNLEIKUR**<br>*Góður livandi tónleikur verður í tjaldinum uttanfyri Disvoy við Jákup og boyggjunum.* |

# SUNNUDAGUR 7. SEPTEMBER



| | | |
|---|---|---|
| **11.00** | **KIRKJAN** | **SKAPANARGUÐSTÆNASTA**<br>*Skapanargudstænasta verður við Lis Samuelsen, presti. Eftir gudstænastuna verður kirkjukaffi úti í forkirkjuni.* |
| **12.30 - 16.00** | **KRAMBÚÐIN** | **KAFE OG KRIA SMÚKKUR**<br>*Kafein hevur opið og eisini ber til at koma á gátt og gera smúkkur.* |
| **14.00** | **ÍTRÓTTAHØLLIN** | **SÚKKLUTÚRUR NORÐUR Á FOSSARNAR**<br>*Góður súkklutúrur norður á Fossarnar. Møtið uttanfyri høllina. Jan Nielsen skipar fyri.* |
| **17.00 - 19.00** | **MISSIÓNSHÚSIÐ** | **OPIÐ HÚS, KAFFI OG SANGUR** |
| **17.00 - 19.00** | **VEKTARBÚÐIN** | **BINDIKAFE**<br>*Ókeypis bindiskeið við Navia. Tilmelding fer fram við at senda teldupost til home@heimaafitjum.com* |